# – Uppsagnirnar koma ikki óvart á okkum

**Vit hava leingi vitað, at høgi oljuprísurin hevði við sær, at tað var ringt hjá reiðarínum at fáa endarnar at røkka saman, sigur 1. stýrimaður á Kappanum, Sámal Henriksen**

KAPPIN LAGDUR

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Síðan í mai-mánaði 2003 hevur klaksvíkingurin, Sámal Henriksen, verið 1. stýrimaður á rækjuskipinum Kappanum av Oyri. Á seinasta túrinum hjá skipinum fekk hann saman við 10 øðrum umborð boð um, at teir vóru uppsagdir.

– Tú kanst ikki beinleiðis siga, at hett kom óvart á okkum, at skipið nú verður lagt. Vit hava leingi vitað, at høgi oljuprísurin hevði við sær, at tað var ringt hjá reiðarínum at fáa endarnar at røkka saman, sigur Sámal Henriksen

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Sámal Henriksen er uppsagdur á Kappanum. Í fjør varð Kappin eisini lagdur og manningin uppsøgd, men stórur partur av manningini kom umborð aftur, tá nýggir eigarar keyptu Kappan.

*Hvørji eru útlitini hjá tykkum at fáa annan møguleika?*

Tað er torført at fáa nakran nýggjan møguleika. Sammeta vit bert fyri nøkrum árum síðan, so er tað nógv torførari at fáa møguleika í dag enn tá, tí fleiri og fleiri gerast arbeiðsleysir. Tú fært meg kortini ikki at tað er fullkomiliga ómøguligt, svarar Sámal Henriksen.

Hann leggur afturat, at tað stóð tveimum monnum á Kappanum í boði at fara við rækjubátinum Sólborg mánadagin, men eingin tók av. Kappin kom heim seinasta fríggjadag, og tískil gjørdist skotbráið í so stutt at fara avstað longu mánadagin við Sólborg, mettu menninir á Kappanum.

Á Kappanum vóru níggju føroyingar og tveir litavar umborð.

Rækjuskipið Kappin lagdur:

# 11 mans uppsagdir

**Høgur oljuprísur og lágur rækjuprísur hevur við sær, at rækjuskipið Kappin av Oyri er lagdur. Skipið er sett til sølu, og 11 mans eru uppsagdir**

RÆKJUVINNA

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Rækjuskipið Kappin av Oyri er lagdur. Høgur oljuprísur og lágur rækjuprísur ger, at tað ikki loysir seg at fara til fiskiskap*

*Mynd: Savnsmynd*

Tey fella sum flugur. Rækjuskipini. Herfyri var Høgifossur lagdur og nú stendur rækjuskipið av Oyri, Kappin, fyri tørni.

Høgur oljuprísur og lágur rækjuprísur gjørdist ov tungur burður hjá felagnum P/F 14. juli 2004 av Oyri, sum eigur Kappan. Skipið er nú lagt og sett til sølu. Felagið hevur eisini boðað teimum 11 monnunum umborð, at teir eru uppsagdir.

Hans Jákup D. Johansen er reiðari á Kappanum og hann greiðir frá, at tað snøgt sagt ikki loysir seg hjá skipinum at vera til fiskiskap, og tískil er báturin lagdur.

– Bara fyri einum ári síðan kostaði tað okkum 800.000 krónur at bunkra, og nú kostar tað 1,8 mió. krónur. Prísurin fyri ídnaðarrækjur er eisini lágur, so útlitini fyri at fáa skipið at bera seg eru rættiliga døpur. Vit tóku tí ta støðu í farnu viku at leggja bátin, sigur hann

Tað er ikki meir enn eitt ár síðan, at felagið P/F 14.juli 2004 á Oyri keypti Kappan frá P/F O.C. Trol á Oyri fyri 11 mio. krónur. Fremsta orsøkin til, at rækjuskipið varð keypt var at tryggja rækjuvirkinum á Oyri ráðvøru.

Reiðarin á Kappanum sigur, at felagið ikki hevur sett nakran søluprís, men ásannar, at marknaðar-prísurin ikki er høgur í løtuni.

– Sjálvsagt vóna vit at fáa tað sama fyri hann, sum vit keyptu hann fyri. Kortini eru útlitini fyri at fáa eitt rækjuskip at bera seg døpur, og hetta ávirkar sjálvsagt marknaðarprísin, sigur Hans Jákup D. Johansen.

### Ávirkar virkið

Fyri nøkrum vikum síðan fór rækjuskipið í Sandavági, Høgifossur í gjaldssteðg og varð lagdur. Bæði Høgifossur og Kappin hava verið týdningarmiklir rávøruveitarar hjá rækjuvirkinum á Oyri.

Reiðarin á Kappanum, Hans Jákup D. Johansen er eisini stjóri á rækjuvirkinum á Oyri, og spurdur, hvør avleiðingin er fyri virkið, at tvey skip eru løgd, svarar hann:

– Sjálvandi ávirkar tað okkum, at tveir av okkara rávøruveiturum eru lagdir. Kappin hevur vanliga fiskað 2000 tons av rækjum árliga, so tað merkist sjálvsagt. Í løtuni mugu vit rinda 20 % í tolli fyri at keypa rækjur úr Íslandi, Grønlandi og Kanada, og tað ger, vit hava ógvuliga torført við at vera kappingarførir. Baltiskar rækjur eru hinvegin tollfríar, og tí fara vit at leggja okkum eftir at keypa baltiskar rækjur til virkingar, vísir stjórin á.

Hans Jákup D. Johansen sigur seg vóna, at kummuleringsavtalan hjá ES fæst í lag sum skjótast. Hetta vil geva virkinum á Oyri møguleika at innflyta norskar og íslendskar rækjur tollfrítt, og hetta vil betra munandi um møguleikarnar hjá virkinum á Oyri at fáa rávøru.

### 3 bátar eftir

Rækjuflotin hjá Føroyum er veruliga tódnaður seinastu árini. Eftir at Kappin og Høgifossur eru lagdir eru bert Sólborg, South Island og Napoleon eftir í føroyska rækjuflotanum.

Fyri fáum árum síðan varð Hvilvtenni seldur til Íslands, meðan Arctic Viking og Fullberg eru ávikavist flaggaðir út til Litava og Grønlands. Rækjuskipið Sundaberg fiskar ikki rækjur í løtuni, men roynir eftir gullaksi.

## FAKTA

Bygdur á Brooke Marine Ltd í Onglandi 1971

Útgerðarmaður: Hans Jákup Drangastein Johansen

P/F 14. juli 2004 á Oyri keypir Kappan frá P/F O.C. Trol fyri 11. mió. krónur 19. juli 2004

**Fyrrverandi nøvn:**
Kappin, 2003 (FD 1182-Oyri)
Kappin, 1999 (TN 124-Tórshavn)
Olympic Prawn, 1995

# Felag fyri hestaáhugað

Sunnudagin hin 3. juli kl 19 varð stovnandi aðalfundur hildin fyri hesta áhugaði í Suðuroy.

Til fundin, sum varð hildin í skúlanum í Hovi, vóru møtt 16 fólk.

Semja var um at kalla felagið fyri Suðuroyar Hestafelag

Í nevndina, sum skipaði seg beint eftir fundin komu:

- Petur Frederik Holm, formaður
- Trygvi Midjord, skrivari
- Marit Petersen, kassameistari

Endamálið við felagnum er at fylkja allar hestamenn í suðuroy og stimbra áhuga og dugnasemi í ítróttinum frá aling til undirhald og kapping.

Miðjað verður eftir at bøta um umstøðurnar soleiðis at fleiri kunnu fáa møguleika at íðka henda ítrótt, undir betri og tryggari umstøðum. Samtykt var eisini at søkja um limaskap í ISF.

Hevur tú hug at vera við í felagnum gerst tað við at boða einum av nevndarlimunum frá.

Limagjaldið er kr. 100 um árið.